# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Aldarinnar vitjan

Once in a lifetime. Soleiðis verður tikið til, tá tað er okkurt, sum bara hendir eina ferð. Og hesi orðini munnu føroyingar sanna í hesum døgum, nú fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton er á veg til Føroya. Mánadagin fara hann og Hans Blix, fyrrv. vápnaeftirlitsmaður hjá ST, at halda fyrilestrar í Norðurlandahúsinum. Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum hevur tikið stig til at bjóða hesum báðum heimsstjørnunum henda vegin.

Hóast altjóðagerð og betri ferðingarmøguleikar eru Føroyar framvegis fjarskotnar í eygunum á teimum flestu. Tað kunnu tað so bæði vera fyrimunir og vansar við. Men fyri tey her á landi, sum fegin síggja eina munadyggari ferðavinnu og síggja, at dyrnar til land okkara verða latnar víðopnar, er ein slík vitjan sjálvandi sera kærkomin. Tí hon er við til at selja Føroyar sum eitt nú ferðamannaland. At meiri kunning og vitan um okkara land kemur út til onnur lond og fólk kann so eisini gagna okkum í aðrar mátar. At vit flyta okkum frá ”dunnuhylinum” og gerast meira heimsborgarar. Ein tjóð sum okkara hevur avgjørt gott av at fáa íblástur uttanífrá eisini, hóast vit vilja varðveita og verja sereyðkenni, siðir og mentan.

Vinnuhúsið, sum stendur fyri hesi vitjanini, eigur rós uppiborið fyri tað stóra arbeiði, ið er lagt í at fáa hesa vitjan í lag og fyrirreika hana. Vit ynskja øllum teimum, sum hava vit vitjanina at gera, góða eydnu. Nú eru tað so bara veðurgudarnir, sum kunnu forkoma okkum henda so einastandandi møguleika.

Ein kann sjálvandi spyrja, hví vit skulu leggja so nógva í eina slíka vitjan! Svarið er einfalt: hon er við til at seta Føroyar á heimskortið. Hon kann lata nógvar dyr upp, og vit skulu heldur ikki gloyma, at land okkara eisini hevur nógv at bjóða gestum og umheiminum. Hví ikki gera Føroyar til stað, har toppfundir á politiskum stigi verða hildnir. Til slíkar toppfundir hoyrir eisini kenslan av friðsælu og at kunna flyta seg frá stórbýarresinum til náttúruperlur og pláss, sum rætt og slætt eru øðrvísi.

Ein týðandi táttur í sambandi við slíkar vitjanir eru tey mongu fjølmiðlarfólkini, sum koma til landið. Miðlahúsið í Vágsbotni hevur gjørt av at lata upp dyrnar fyri hesum fólkum og fer húsið at virka sum altjóða pressusentur rundan um Clintonvitjanina.

**Sosialurin**

## Vanlukkutryggingarráðið livir upp til navnið?

**JAN HØJGAARD**
Føroya Fiskimannafelag



Grein í Sosialinum hjá Thomas J. Askham burdi fingið okkara mynduleikar at vakna. Tá eg sigi burdi, er tað tí, at eg ikki vænti at tað rørir nakran í politisku skipani ella innan almennu umsitingina. Hetta hevur ført til, at Tryggingarfelagið Føroya, hevur kunnað hóreiggjað sær sum teimum lystir.

Tað skal sigast beinanvegin, at álvarsomu avgerðirnar, sum Vanlukkutryggingarráðið og almenna tryggingin semjast um er beiskur kostur hjá teimum, sum er rakt av óhappi. Málsetningurin tykist vera, at skaðarakti undir ongum umstøðum skal fáa tað, hann hevur rætt til. Um tað ikki ber til, so roynir man at hava útgjaldið so lágt sum møguligt.

Uppleggið tykist vera, at man avmaktar skaðarakta sálarliga, so hann gevst at stríðast fyri sínum rætti. Tey sum sita í Vanlukkutryggingarráðnum vita av royndum, at tá fólk koma illa fyri, so hava tey helst ikki orku at krevja sín rætt. So tey gera bart, og senda skaðarakta frá einum staði til annað, ofta skal ein lata somu skjøl, upp í fleiri ferðir?

Tað eru fá, ið hava orku at stríðast fyri sínum rætti, og um onkur av teimum avvarðandi ikki trakkar til, verða tey sjálv trakkað niður. Hetta eigur ikki at vera so, tí mugu vit stríðast av øllum alvi.

Tí er tað mín áheitan til alt okkara sjófólk, verkafolk og onnur, at standa lið um lið, tá FF gevur Vinnumálaráðnum eitt krav um, at allir borgarar skulu vera fíggarliga dekkaðir, um skaði rakar. Um ikki, verða fiskimenn noyddir, at seta hart móti høðrum. Tí vit kunnu ikki góðtaka, at fiskimenn í sínum vandamikla starvi, ikki eru tryggaðir á nøktandi hátt.

Tað besta ein kann siga um Vanlukkutryggingarráðið er, at tað so saniliga livir upp til navnið. Tað er ein sonn vanlukkulig lagna at skula stríðast móti hesum harkaliði, sum so nógv spurnartekin verða sett við. Sum ein sera móður og hart koyrdur maður tók til nú ein dagin, ”hatta eru harðkókaðir kriminellir fýrar.”

Havi sjálvur sett mær spurningin, hava vit ikki brúk fyri mannarættindisfelagsskapi, sum tekur sær okkar illa viðfarnu borgarum? Havi nú ein tíð spælt mær við tankan um, at borgarar, sum hava verið fyri ágangi kundu samlast, so vit fingu eina rørslu, sum hart og kontant átalaði brot á mannarættindini.

Vit skulu ikki góðtaka, at ágangurin og sorgarleikurin heldur á, vit skulu hevja okkar rødd og krevja rættvísi. Thomas J. Askham hevur víst dirvi, og vit eiga at vísa í verki, at vit standa saman við honum og øðrum, sum hava verið fyri vanbýti.

## Det er for dårligt, Heðin Mortensen

**NINA DAHL**

Vedrørende trafikforholdene ved Hoyvíkar Skúla.

Mens vi venter, Heðin Mortensen, kan du måske indledningsvis svare på, hvornår den parkeringsplads skal være færdig?

Og dernæst: Kan du være så venlig at svare på, om kommunen finder det acceptabelt, at man, mens man planerer til parkeringspladsen, sløjfer den sti fra busstoppestedet, hvor børnene trygt kunne gå, og tvinger dem til at gå imellem bilerne i selve opkørslen til skolen. – Er det det, der hedder god færdselskultur?

Børn og biler skal være adskilt! Man kan ikke tale om trivsel på skolen, så længe trafikforholdene er, som de er.

Inde er trygt og godt - - ude er kaos, og du er ansvarlig, Heðin Mortensen.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.